# PÁSKASTEVNAN 2000

SEYMISTOVAN HJÁ VÓNBJØRT, SANDVÍK
THOMAS DAM AMBOÐ
D.J.ENNI
HÚSBÚNI
BABY- & BARNAÚTGERÐ
FØROYA BJÓR
FØROYA TELE
PENTELD
SOFUS DIMON
FEÐGAR
TOYSTOVAN
HONDARBEIÐSBÚÐIN
HERLUF B. THOMSEN
SUPER DEKK
TEKNISKI SKÚLIN
REYNI SERVICE
ALVAL
BÆRENDSEN TEKNIK
NORDBIL
TUTL
SUÐUROYAR ULLVIRKI
KARL ØSTER'S BLÓMUHANDIL
THOMAS DAM ÍTRÓTTUR
SONJA DESIGN
SUZUKI
BERG MOTOR

FØROYA SPARIKASSI

...............stuðlar



## Ítróttarhøllin í Trongisvági

| | |
|---|---|
| TÓRSDAGIN 13. APRÍL | 16 - 22 |
| FRÍGGJADAGIN | 16 - 22 |
| LEYGARDAGIN | 14 - 21 |
| SUNNUDAGIN | 16 - 20 |

**Dan Nielsen, borgarstjóri setur stevnuna tórskvøldið kl. 18:00**

"SHALDER GEO" við m.a. Kristian Blak
Rebekka Blak
Rakul & Magni
Dansigentur úr Porkeri
Mótasýningar
Sangkórið Ljómur
Tvøroyrar Hornorkestur

**Dansur í TB-Húsinum leygarkvøldið har TRIO spælir**
( ikki íroknað atgongumerkið)

**Atgongumerkini á stevnuni eru samstundis lutaseðlar til hópin av vinningum, sum verða drignir hvørt kvøld. Høvuðsvinningurin, eitt komplett Hi-Fi stereo anlegg - virði 14.000,- frá Bærendsen Teknik á Tvøroyri, verður drigi sunnukvøldið kl. 19:30.**

**LIONS CLUB SUÐUROY skipar fyri tivoli í skúlahøllini allar dagarnar. Har verður tombola av ymiskum slag, skaviseðlar við góðum vinningum, søla av popkorni og kúluísi v.m.**
**Leygardagin verða klónar at undirhalda**

**Kostn. Vaksin kr. 40,-**
**Børn kr. 20,-**

*Páskastevnan 2000*
handils- & sølustevna í Trongisvági






TRYGDARSKEIÐ
-ið snýr seg um tína trygd á arbeiðsplássinum

*"Ein sera stuttligur háttur at gerast gløggari"*

- **Hvørjir vandar eru við nýtslu av gassum?**
- **Hvørji trygdar- og arbeiðsumhvørvistiltøk eiga at verða framd?**

Føroya Gassøla heldur í viku 19 eina røð av trygdarskeiðum í sambandi við nýtslu av gassi. Hesi skeið verða skipaði av trygdarábyrgdarum frá AGA, ið hava nógvar royndir innan hald av trygdarskeiðum í Danmark, t.d. fyri sløkkilið og Falck, tekniskar skúlar og ídnaðin á øllum stigum. Skeiðini venda sær til øll, ið hava áhuga fyri trygdini hjá virkinum og sær sjálvum. Umframt hetta snýr skeiðið seg eisini um eginleikarnar við gassi og hevur í sær nógvar praktiskar royndir. Tú hevur møguleika at verða við í fylgjandi skeiðum, sum hvør sær varar 3-4 tímar:

| | | |
|---|---|---|
| **Mánadagin** | **8. mai** | **Sørvágur** |
| **Týsdagin** | **9. mai** | **Klaksvík** |
| **Mikudagin** | **10. mai** | **Tórshavn** |
| **Hósdagin** | **11. mai** | **Øravík** |

**Ynskjast fleiri upplýsingar set teg í sambandi við:**

Føroya Gassøla
Akranesgøta 2
FO-100 Tórshavn
Tel. 31 55 44
Fax 31 17 06

Ring og tekna teg ella starvsfólk tíni á tel. 31 55 44 ella 21 25 44.
Kostnaðurin er kr. 195,- fyri fólkið íroknað breyð og kaffi.

AGA SETUR TRYGDINA Í HÁSÆTI AGA

Sosialurin - 311820



## Virkisráðgevi

**Vit hava úr at gera –**
**og søkja ágrýtnan virkisráðgeva m/k:**

Endamál TK-Stovunnar er at menna og styrkja føroyskt vinnulív. TK-Stovan skal ráðgeva fyritøkum, midla nýggja vitan, sum er viðkomandi í vinnulívinum, og kunna um og ráðgeva føroyskum fyritøkum um galdandi vinnuframaskipanir. Arbeiði TK-Stovunnar tekur støði í tørvi vinnunar og fer fram í samstarvi við aðrar føroyskar vinnuframastovnar. TK-Stovan heldur til í Tórshavn. Á stovuni arbeiða 4 fólk.

**Starvið:**
Tú skalt, eggjaður av virkjum eins væl og sjálvboðin:
- eggja virkisleiðslunum til og saman við teimum viðgera ítøkiligar menningarmøguleikar á økjum sum t.d. marknaðarviðurskifti, framleiðslu, vørumenning, tøkni, búskapi og leiðslu.
- kunna um vinnuframaskipanir og eftir tørvi útvega virkjum vitan av so at siga øllum slagi.
- midla uppgávur/verkætlanir til uttanhýsis serfrøðingar.
- skipa fyri og leiða kunningarfundir um evni av týdningi fyri føroyskt vinnulív.

**Vit vænta av tær:**
- at tú hevur nakað av kunnleika um føroyska vinnu og at tú hevur arbeiðsroyndir.
- at tú ert opin/fryntlig(ur) og dugir at fáa í lag samband við fólk. At tú kannst skera ígjøgnum, samstundis sum tú dugir at lurta eftir øðrum.
- at tú hevur tøkniligan og/ella handilsligan ástøðiligan førleika. Umsøkjarar við tøkniligum royndum hava fyrimun.
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og klára at arbeiða við fleiri ymiskum málum samstundis.
- at tú talar og skrivar føroyskt og danskt flótandi.
- telduførleiki á høgum brúkarastøði.

Vit kunna bjóða tær nógvar áhugaverdar avbjóðingar og í einum sjálvstøðugum starvi við møguleika at gera júst tína ávirkan galdandi. Samstundis verður tú við í menningini av føroyska vinnulívinum. Løn sambært avtalu.

**Nærri upplýsingar:**
Vilt tú vita meira áðrenn tú søkir, ert tú vælkomin at tosa við Ólav Gregersen, stjóri, tlf. 317366.

Skrivlig umsókn, merkt »Virkisráðgevi« við próvtøkuskjølum/viðmælum skulu sendast til TK-Stovan, Niels Finsensgøta 37, 100 Tórshavn **í seinasta lagi 26. apríl 2000.**

TK-Stovan er partur av neti við 17 landspartastovum í Danmark og so samskipannarstovuni í Århus, TIC Danmark. Tilsamans arbeiða 115 fólk í TK-netinum. Endamálið hjá TK-netinum er at styrkja menningina í vinnulívinum. Hetta gerst við at arbeiða málrættað og samskipað. Hetta fyri at menningarmøguleikarnir í smærri og meðalstórum virkjum verða viðurkendir og troyttir. TK-Stovan er fíggjað av Føroya Landsstýri og donsku stjørnini.



SETEPLIR

**Vit hava 5 ymisk sløg av set á goymslu**

M3M FÓÐUR

**Kollafjørður**
Tlf. 42 14 78

**Tórshavn**
Vegurin Langi
Tlf. 42 13 00

Sosialurin - 311820




# Høgni er óseriøsur

*Katrin Dahl Jakobsen heldur Høgna Hoydal misrøkja starv sítt sum landsstýrismaður í undirvísingar- og mentamálum, tá hann ikki hevur stundir at svara fyrispurningi innan hetta málsøki*



*Eg haldi tað vera heilt burturvið, at Høgni Hoydal sum landsstýrismaður í undirvísingar- og mentamálum ikki skal hava stundir at seta seg inn í ein fyrispurning, ið snýr seg um eitt álvarsmál innan skúlaverkið í dag, sigur Katrin Dahl Jakobsen.*

JOHN JOHANNESSEN

Tingkvinnan, Katrin Dahl Jakobsen, setti 22. mars landsstýrismanninum í undirvísingar- og mentamálum nakrar fyrispurningar í sambandi við læraraverkfallið. Hesir fyrispurningar skuldu svarast í tinginum í gjár.

Men fyrrpartin í gjár fekk tingkvinnan bræv frá løgtinginum, har boðað varð frá, at landsstýrismaðurin hevur fingið freistina at svara spurningunum útsetta.

Grundgevingin fyri hesum var, nýggi landsstýrismaðurin, Høgni Hoydal, hevur verið so nógv burturstaddur, at hann ikki havt stundir at seta seg inn í málið.

### Røkir ikki embætið

Katrin Dahl Jakobsen heldur hesa grundgeving vera ógvuliga vánaliga. Hon vísir á, at hetta bert sýnir okkum, at Høgni Hoydal ikki røkir tað embætið, hann tók á seg, tá Signar á Brúnni fór frá sum landsstýrismaður í undirvísingar- og mentamálum og Høgni Hoydal kom í staðin.

– Eg haldi tað vera heilt burturvið, at Høgni Hoydal sum landsstýrismaður í undirvísingar- og mentamálum ikki skal hava stundir at seta seg inn í ein fyrispurning, ið snýr seg um eitt álvarsmál innan skúlaverkið í dag, sigur Katrin Dahl Jakobsen.

Tingkvinnan heldur, at støðan innan skúlaverkið beint nú er so mikið álvarslig, at bæði landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum og øll embøtisfólkini í stýri hansara áttu at nýtt alla orku í at fingið loyst trupulleikan.

Hon sigur seg skilja, at Høgni Hoydal var í Danmark, tá orðaskifti var á fólkatingi um fullveldismálið. Men hon vísir samstundis á, at løgmaður hevði stundir at koma heim aftur til Føroya og møta í tinginum fríggjamorgunin, meðan Høgni Hoydal varð verðandi í Danmark í sambandi við, at ein nýggj bók kom ut um fullveldisætlanina.

– Hetta er heilt burturvið. Sjálvsagt skuldi Høgni Hoydal komið aftur og loyst trupulleikan á skúlaøkinum, sigur Kartin Dahl Jakobsen avgjørd.

### Landsstýrismaðurin skiftur

Høgni Hoydal heldur tað ikki vera rætt av Katrini Dahl Jakobsen at seta málið so stórt upp. Hann vísir á, at fyrispurningurin kom áðrenn landsstýrismaðurin varð skiftur, og tí kann hann ikki hava havt stundir at fyrireika seg til fyrispurningin.

– Eg vil beinan vegin leggja dent á, at eg bert fyribils eri landsstýrismaður í undirvísingar- og mentamálum. Men eg vil fegin vera heilur har eg eri. Tí ætli eg mær at seta meg væl inn í málið áðrenn eg svari fyrispurninginum, so Katrin Dahl Jakobsen fær eitt nøktandi svar, og tað átti hon at fegnast um, sigur Høgni Hoydal.

Landsstýrismaðurin við tveimum stýrum ásannar, at tað ikki í longdini fer at bera til at hava tvey stýri undir sær, men hann staðfestir samstundis, at hann enn ikki hevur forsømt nakað av sínum málsøkjum.

Høgni Hoydal leggur afturat, at hann heldur tað vera ivasamt, um tað í heila tiki er rætt av Katrini Dahl Jakobsen, sum er limur í Lærarafelagnum at seta fram fyrispurningar, ið beinleiðis hava við sáttmálatrætuna at gera.

Katrin Dahl Jakobsen heldur kortini einki skeivt vera í hesum.

# Yvirlýsing um verkfallið í fólkaskúlanum

Verkfallið í fólkaskúlanum eigur at kennast sum skot fyri bógvin hjá politisku flokkunum og føroyskari lóggávu. Hetta eigur tingið at taka til sín.

Javnaðarflokkurin harmast um, at skotini ístaðin raka óseku skúlanæmingarnar og foreldur teirra. Og tey eru mein. Vandi er fyri, at teir næmingar, sum standa á gáttini til hægri skúla, fara at hava tað truplult við at sleppa inn í hesar skúlar. Javnaðarflokkurin ber eisini ótta fyri teimum mongu børnunum, sum eingin er um, og at skaði kann standast av hesum.

Tí er avgjørt neyðugt, at semja fæst í málinum sum skjótast.

Við nýggju fólkaskúlalógini hava vit latið dyrnar upp til vitanarsamfelagið. Hugburðurin er at geva okkara børnum og ungu ein førning, sum lærir tey at læra. Tað, tú dugir í dag er umráðandi. Men uppaftur meira umráðandi er, hvat tú fert ella kanst læra í morgin.

Á henda hátt at seta næmingin í miðdepilin, gevur nógv.......og krevur nógv!!

Hesum borgar nýggja fólkaskúlalógin fyri, tá umstøður verða givnar at fremja hana í verki.

Eisini eiga vit at minnast til, at fólkaskúlin er veitari til allar aðrar útbúgvingar umframt arbeiðsmarknaðin. Hann hevur ábyrgdina av teimum ungu í teirra mest móttøkuføra aldri, tá støðið undir allari samfelagsligari menning verður lagt.

Javnaðarflokkurin virðir verkfalsrættin hjá sáttmálasettu lærarunum.

Somuleiðis at sáttmálasettu lærararnir brúka hesi rættindi at stuðla fakfelag og starvsfeløgum sínum at fremja lógarásettu uppgávurnar í fólkaskúlanum til frama fyri næmingin og skúlaverkið.

Flokkurin tekur ikki undir við teimum, sum mæla til at steðga á og enntá ganga afturá. Heldur vil flokkurin heita á Fíggjarmálastýrið, Undirvísingar og Mentamálastýrið og Lærarafelagið at finna rætta stevið og koma til semju um kostnaðin av nýggju lógini.

Javnaðarflokkurin vónar, at tað fer at bera pørtunum til at samráða seg fram til eina semju um ikki bara lønina, men eisini um menningina av fólkaskúlanum.

Nú er í tøkum tíma.

**Føroya Javnaðarflokkur**


GSM frá Føroya Tele



**...so ert tú altíð har, tú skalt vera!**

**Vel tað GSM-haldið, ið hóskar best til tín...**

**Vanligt hald**
1,40 kr./min. um kvøldið • Mánaðargjald: 115,00 kr.

**Vinnuhald**
1,60 kr./min. alt samdøgrið • Mánaðargjald: 200,00 kr.

**Frítíðarhald**
0,90 kr./min. um kvøldið • Mánaðargjald: 75,00 kr.

**Frítíðarhald**
Til teirra, sum hava tørv á telefonini í frítíðini, t.v.s. at samrøðurnar eftir kl. 18.00 og sunnudagar eru bíligar. Eisini hevur frítíðarhaldið bíligt stovningar- og mánaðargjald.

| Kostnaður fyri frítíðarhald | |
|---|---|
| Stovning | 300,00 kr. |
| Mánaðargjald | 75,00 kr. |
| Minuttgjald - dag | 4,00 kr. |
| Minuttgjald - kvøld | 0,90 kr. |
| Uppringingargjald | 0,40 kr. |

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • www.tele.fo